# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg vænti, at eg fari at fáa millum 70 og 80 prosent av atkvøðunum á forsetavalinum*
*(José Ramos-Horta)*

# Anders Fogh hóttir við vali

**Meirilutin hjá donsku stjórnini og Danska Fólkaflokkinum er tódnaður, so nú hava flokkarnir bara tveir tinglimir í meiriluta**



*Anders Fogh Rasmussen: - Tað kann fáa avleiðingar, at tinglimir stinga í sekkin*

Tann 29. apríl fór Morten Messerschmidt burtur úr fólkatingsbólkinum hjá Danska Fólkaflokkinum, 8. apríl gjørdi tók Louise Frevert sama stig, og í morgun kunngjørdi Leif Mikkelsen, at hann hevði tikið seg burtur úr fólkatingsbólkinum hjá Vinstra og var farin upp í Ny Alliance.

Sostatt hava Vinstri, Konservativi Fólkaflokkurin og Danski Fólkaflokkurin 91 tinglimir eftir, og tað er ein meiri, enn minsta krav til meiriluta er. Tískil tolir stjórnin ikki, at fleiri fara burtur úr teimum trimum tingbólkunum, og nú ávarar Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, um, at tað fær avleiðingar, um fleiri stinga í sekkin:

- Enn er tann parlamentariska støðan ikki broytt, men skuldi tað hent, at hon verður broytt, so vita øll, hvørjar avleiðingar tað fær, segði forsætisráðharrin við danska sjónvarpið fyrrapartin.

Spurdur, hvørjar avleiðingar hann hugsaði um, svaraði hann stutt:

- Tað skuldi ikki verið neyðugt at lýst tað nærri.

Forsætisráðharrin vildi ikki siga, at orð hansara eru ein ávaring til tinglimirnar hjá teimum trimum flokkunum, men heldur ein staðfesting av veruleikanum.

# Hann vann stórsigur

**José Ramos-Hortam vann forsetavalið í Eystur-Timor**

Forsetaval var í Eystur-Timor í gjár, og sjálvt um tað almenna og endaliga úrslitið ikki kemdur fyrr enn í nátt ella í morgin, er tað longu greitt, at José Ramos-Horta hevur vunnið. Ramos-Horta er forsætisráðharri frammanundan.

-Tað kann væl vera, at eg havi fingið millum 70 og 80 prosent av atkvøðunum, segði hann við tíðindafólk í gjár, og hann fekk rætt. Tá 90 prosent av atkvøðunum vóru taldar, hevði hann fingið 73 prosent. Meiningakanningarnar undan valinum vístu eisini greitt, at hann fór at vinna.

Hansara mótvalevni er Francisco Guiterres, sum í mong ár var ein av leiðarunum í frælsisstríðnum, sum endaði, tá indonesiski stjórnarherurin tók seg aftur í 1999. Tey næstu árini vóru innanhýsis bardagar, til ST-hermenn fingu skilt partarnar sundur. Í 2002 fekk Eystur-Timor altjóða viðurkenning sum sjálvstøðugt ríki.



*José Ramos-Horta, nývaldur forseti í Eystur-Timor*

## STUTT SAGT

### Dømdur fyri leka

Ein embætismaður í bretsku stjórnarumsitingini bleiv í gjár dømdur fyri at hava latið fjølmiðlunum loyniligar upplýsingar frá einum fundi millum Tony Blair, forsætisráðharra og George W. Bush, forseta. Í einum notati frá fundinum stóð, at Bush hevði ætlanir um at bumba høvuðsstøðina hjá arabisku sjónvarpsstøðini al-Jazeera í Qatar, men at Blair var ímóti tí. Hóast notatið var loyniligt, skrivaði blaðið Daily Mirror um tað seinni, og tað kom fram, at tað var ein embætismaður, sum hevði latið blaðnum innihaldið. Í rættinum í gjár segði tann 50 ára gamli embætismaðurin, at hann helt ikki, at tað órógvaði Bretlands trygd ella áhugamál, at innihaldið í notatinum bleiv alment.

### Savna mat

Myndugleikarnir í Kuwait bera ótta fyri, at ósemjan um iransku kjarnorkuverkætlanina kann enda við kríggi, og tí hava teir gjørt av at fyrireika landið til eitt møguligt kríggj. Almenna tíðindastovan KUNA skrivaði í gjár, at eftir boðum frá myndugleikunum eru nógv túsund tons av mati savnað saman í goymslum ymsastaðni kring landið, so fólkið skal fáa mat í munnin, skuldi kríggj brostið á. Í Kuwait bera tey eisini ótta fyri, at amerikanararnir kunnu finna uppá at bumba kjarnorkuverk í Iran. Eitt av verkunum er bara 300 kilometrar frá kuwaitiska markinum.

### Stillar uppaftur

Forsetin í Kekkia, Václav Klavs, kunngjørdi í gjár, at hann stillar uppaftur á forsetavalinum, sum verður næsta ár. Boðini komu, eftir at stjórnin hevði kunngjørt, at hon fer at stilla forsetan uppaftur. Václav Klavs skal væntandi dystast ímóti fyrrverandi sosialdemokratiska uttanríkisráðharranum Jiri Dienstbier. Václav Klavs hevur verið kekkiskur forseti síðani 2003, tá hann tók við eftir Vaclav Havel.